# Vágbingar ikki til at vika

**Fyribils eru ongi tekin um, at meirilutin í Vágs Býráði er til at vika, sigur Kirstin Strøm bech, borgarstjóri**

SUÐUROYARPAKKIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Aftur týsmorgunin vóru mótmæli at síggja í Vági frá teimum sum krevja, at miðnámsskúlin skal byggjast í Vági. Hendan plakatin varð hongd upp við innkoyringina til Vág týsmorgunin. Myndina tók Erik Christensen*

–Eg havi ikki varhugan av, at fundurin ímillum landsstýrið og kommunurnar í Suðuroy, hevur fingið meirilutan í Vágs Býráð at broyta støðu.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági hevur ikki kensluna av at tað, sum landsstýrið hevði at bera fram, hevur fingið meirilutan í býráðnum at vikast.

– Sostatt er støðan hjá Vágs Býráði óbroytt og tann støðan er, at býráðið heldur fast um, at miðnámsskúlin skal byggjast í Vági.

Vágs Býráð hevði fund mánakvøldið sum landsstýrið kom suður týsdagin og har staðfesti meirilutin í býráðnum enn einaferð at tað stendur fast við, at miðnámsskúlin skal byggjast í Vági.

Borgarstjórin sigur kortini, at Landsstýrið hevur boðað frá, at kommunurnar nú skulu fáa skriv frá landsstýrinum um ætlanina við eini tíðarætlan og tað má býráðið sjálvsagt at taka støðu til.

Annars er tað onki dulsmál, at sjálv hoyrir Kirstin Strøm Bech til tann minniluta í Vágs Býráð, sum tekur undir við ætlanini og hon hevur ikki broytt støðu.

– Eg standi fast við, eg taki undir við ætlanini, tí eg haldi, at vit hava stórliga brúk fyri almennum arbeiðsplássum í Vági.

Hon sigur, at eitt er tað arbeiðið, sum eitt slíkt røktarheim skapar, men tað er heldur ikki smávegis, hvat eitt slíkt røktarheim kastar av sær í nærumhvørvinum til avleiddar vinnur, tí eitt slíkt røktarheim hevur brúk fyri nógvum vørum og tænastum.

Borgarstjórin ásannar, at í hesum máli stendur Vágs Býráð reiðiliga einsamalt við síni mótstøðu ímóti ætlanini.

– Tað einasta, sum stendur eftir við greiðari mótstøðu ímóti ætlanini er Vágs Býráð.Tað kann føra til, at vágbingar koma at standa einsamallir í Suðuroy. Men tað má so vera, tí býráðið hevur tikið eina avgerð og tað má býráðið eisini taka avleiðingarnar av, sigur Kirstin Strøm Bech.

# Fult álit á leiðsluni á Landssjúkrahúsinum

**Landsstýrismaðurin í heilsumálum er kunnaður um umleggingarnar á føðideildini og hjá honum er onki himpr**



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg havi fult álit á leiðsluni á Landssjúkrahúsinum Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, himprast ikki við at lata leiðsluna á Landssjúkrahúsinum seta ætlaðu umleggingarnar á føðideildini í verk.

Hann sigur í eini stuttari viðmerking til málið, at hann er kunnaður um umleggingarnar frammanundan.

Hann sigur, at Landssjúkrahúsið hevur havt trupulleikar við at halda játtanini og í eini roynd at fáa betri samsvar ímillum útreiðslur og játtan, hevur leiðslan á Landssjúkrahúsinum gjørt nakrar broytingar, eitt nú á føðideildini.

Broytingar, sum ætlanin er at gera á Landssjúkrahúsinum, eisini broytingarnar á føðideildini eru lagdar fyri landsstýrismannin.

– Broytingarnar á føðideildini eru væl og virðiliga viðgjørdar á fundi ímillum leiðsluna á landssjúkrahúsinum og meg sum landsstýrismann og eg kenni meg tryggan við teirri umlegging, sum ætlanin er at seta í verk.

Hann vísir á, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum umfatar bæði eina læknafakliga leiðslu og eina røktarfakliga leiðslu og tað, sum hendan leiðslan mælir til at seta í verk, følir hann seg tryggan við.

# Umhugsa støðuna á Tvøroyri

**Í Tvøroyrar Býráð ivast tey í tilboðnum frá Landsstýrinum, men nú fara tey at umhugsa støðuna**

SUÐUROYARPAKKI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tvøroyrar Kommuna fer nú at umhugsa tilboðið frá Landsstýrinum um at gera ein skúladepil í Hovi og at byggja røktarheim í Vági.

– Vit hava hoyrt, hvat landsstýrið hevur at siga og nú fara vit at viðgera støðuna, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri.

Tað eru serliga tvey ivamál, sum gera seg galdandi í Tvøroyrar Býráð.

Í fyrra lagi er tað heilsuskúlin á Tvøroyri, sum Tvøroyrar Býráð hevur brúkt milliónа upphædd upp á fyri at geva skúlanum toluligar umstøður á Tvøroyri at virka undir.

Tað er ein spurningur, sum Kommunan vil hava greiði á í hesum sambandi.

Í øðrum lagi staðfestir borgarstjórin, at eldraøkið er framvegis eitt landsmál burturav, sum landið nú ætlar at skáka sær undan við at lata kommunurnar betala 50% av bygginini.

– Ein serlig lóg varð gjørd fyri røktarheimið í Norðurstreymoy fyri nøkrum árum síðani og ta serlógina ætlar Landsstýrið nú at seta í verk allastaðni.

Men tað reingir ikki tann veruleika, at eldraøkið er eitt landsmál burturav.

Kommunurnar koma eisini at fáa ein annan trupulleika og tað er, at eftir lógini kunnu tær ikki taka meiri enn eina álíkning í láni.

Kristin Michelsen sigur tí, at skal kommunan kortini átaka sær ein part av útreiðslunum til eitt røktarheim í Suðuroy, skal tað fáast ein rættiliga góð avtala við Landsstýrið um afturgjalding, tí hann góðtekur ikki, at ein útreiðsla, sum landið eigur, skal smyrjast upp í kommununa og tyngja raksturin ov nógv, so at frælsið hjá kommununi at virka, verður skert ov nógv.

Hann vísir eisini á, at á Sandi hevur landið einsamalt bygt alt eldraøkið upp, uttan at kommunurnar hava betalt nakað.

Somuleiðis vil Landstýrið ikki yvirtaka flogvøllin, fyrrenn hann er dagførdur og nútímansgjørdur.

– Men eldraøkið vil landið hava kommunurnar at yvirtaka, hóast tað er afturúrsiglt so tað munar.

– Talan er tí sostatt um ein rættiliga prinsipiellan spurning hjá Tvøroyrar Kommunu.

Og tí ivast hann eisini í, hvussu gott tilboðið frá Landsstýrinum er í veruleikanum.

Hann ásannar, at tær smærru kommunurnar taka undir við ætlanini, men hann metir, at tað fer at fáa avgerðandi týdning, hvørja støðu tær báðar stóru kommunurnar, Tvøroyri og Vágur, hava.

Men borgarstjórin á Tvøroyri sær eisini eitt annað fyri sær í sambandi við Suðuroyarætlanina hjá Landsstýrinum og tí hevur eisini hug at tengja hetta saman við eini kommunusamanlegging í Suðuroy.

– Kunnu kommunurnar í Suðuroy ikki boða greitt frá, at tær vilja leggja alla oynna í eina kommunu, verður úrslitið, at Tvøroyrar kommuna missur ein skúla, sum kommunan hevur brúkt nógvan pening uppá- og so verða tey 100 arbeiðsplássini á einum røktarheimi í Vági, burturav eitt kommunalt arbeiðspláss í Vági.

Men Kristin Michelsen leggur tó afturat, at nú fer býráðið at viðgera málið í næstu framtíð, so fæst at síggja, hvat úrslitið er.

# Ein fongur fyri Suðuroy

**Jógvan á Lakjuni sigur, at ein skúladepil í Suðuroy hevði verið ein sannur fongur fyri Suðuroynna**

SUÐUROYARPAKKIN
*Áki Bertholdsen*

– Taka suðuroyingar av tilboðnum frá landsstýrinum, fáa teir tveir skúlar í einum.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í skúlamálum, sigur, at tað er stór framtíðarmenning í ætlanini at byggja ein skúladepil í Hovi við miðnámsskúla og heilsuskúla.

Tí heldur hann, at ein slíkur skúladepil hevði verið ein sannur fongur fyri Suðuroynna.

Hann heldur annars, at talan var um ein góðan fund í Øravík týsdagin og hann hevur eisini varhugan av, at onkur sjónarmið vórðu flutt til frama fyri ætlanina.

Hann sigur, at verða skúlarnir bygdir saman, verður byggingin bíligari og raksturin verður eisini bíligari, tí báðir skúlarnir hava nógvar lærugreinar felags, eitt nú samfelagsfak, føroyskt, enskt, lívfrøði og kanska annað við, umframt at annað kann vera felags.

– Tí er tað sjálvsagt, at skúlarnir verða lagdir saman.

Landsstýrismaðurin vísur eisini á, at framtíðin er, at heilsuskúlin verður eitt slag av miðnámsskúla, har tað ber til at fáa eina útbúgving sum síðani gevur atgongd til víðari útbúgving, eitt nú til sjúkrarøktarfrøðing.

Hann sær eisini fyri sær, at fleiri útbúgvingar afturat kunnu verða lagdur í ein skúladepil í Hovi, eitt nú handilsútbúgvingar.

Tí heldur hann, at ein skúladepil í Hovi eisini verður nógv betri hjá vágbingum, tí við fleiri útbúgvingum, fæst eisini eitt betri og størri undirvísingarumhvørvi, eins og tað er lættari at marknaðarføra ein skúladepil við fleiri útbúgvingum.

Kortini ásannar hann, at tað er ein vansi við at skúladepilin liggur í Hovi.

Men hann heldur at fyrimunirnir eru størri.

Somuleiðis kemur skúlin at vera mitt í oynni, so at tað verður líka langt í skúla hjá øllum suðuroyingum.

– Og tað er heilt óhugsandi, at báðir skúlarnir verða lagdir antin í Vági ella á Tvøroyri, tí tað er ómøguligt at fáa politiska semja um.

– Tann møguleikan dugi eg als ikki at síggja, sigur Jógvan á Lakjuni.

Landsstýrismaðurin sigur, at endar tað við, at skúladepilin verður lagdur í Hovi, verður farið undir ætlanina beinanvegin.

– Ein byggiteknisk meting sigur, at farast kann undir byggingina í ár, so at skúlin verður liðugur um hálvtriðja ár, sigur Jógvan á Lakjuni.